## Brókaleysur á Anfield

At tað sanniliga ikki var dagurin hjá Tottenham, tá liðið í farnu viku spældi útidyst ímóti Liverpool, undirstrikar henda søgan: Sebastian Bassong skuldi skiftast inn í seinna hálvleiki, men var um reppið at fara brókaleysur á vøllin. Hann fekk lænt okkurt at fara í, men heldur ikki á vøllinum gekk alt eftir vild, tí í yvirtíðini gjørdi hann brotsspark, so Liverpool kundi tryggjað sær 2-0 sigurin.



## Essien úti í seks vikur

Sterki miðvallarspælarin hjá Chelsea, Michael Essien, noyðist at halda frí frá fótbólti í seks vikur, eftir at hann hevur fingið ein skaða undir African Nations Cup-kappingini. Hetta gjørdist tí ikki tann stóra kappingin hjá ghanesaranum, sum fyrst varð seinkaður úr London, tí veðrið ikki var til vildar, og síðani gjørdist skaddur, bara fýra dagar eftir at hann var komin upp á pláss í Angola.

# Vil royna nakað annað

**Eftir at hava vant kvinnurnar hjá Skála í tvey ár, valdi Ingun Hansen at royna okkurt annað, nú hon fekk møguleika at venja kvinnurnar hjá Víkingi**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Á spælarafundi í ítróttarhúsinum í Leirvík seinnapartin leygardagin hittu spælararnir hjá Víkingi sín nýggja venjara, Ingun Hansen, sum felagið hevði almannakunngjørt í vikuni á heimasíðu síni. Hon skal avloysa Magna Jarnskor, sum frammanundan hevur vant kvinnurnar í Gøtu og Leirvík.

Sum venjari hevur Ingun tvey ára royndir við kvinnuliðnum hjá Skála, og longu í fyrraárið – hennara fyrsta ár sum venjari – var hon millum teirra, sum vóru frammarlaga í kappingini um at gerast ársins venjari hjá kvinnum.

– Tá eg nú fekk møguleikan at gerast venjari hjá Víkingi, valdi eg at taka av, tí eg fegin vildi royna okkurt annað. Hetta er ein spennandi uppgáva, ið kann geva mær møguleika at koma eitt sindur víðari sum venjari, sigur 35 ára gamla Ingun, ið sjálv hevur drúgvar royndir sum íðkandi ítróttarfólk.

Hon hevur bæði spælt fótbólt, hondbólt, badminton og róð um kapp, men mest kend er hon frá sínum virkna fótbóltslívi. Øll árini spældi hon við Skála, sum hon í síni tíð var bæði føroyameistari og steypavinnari við, men í 1994 var hon yvir í Íslandi, har hon spældi eitt kappingarár við Höttur á Egilsstøðum. Harumframt hevur hon spælt fleiri landsdystir og skotið fleiri mál á kvinnulandsliðnum.

### Ingun gleðir seg

Nú hevur Ingun kastað seg út yvir venjingina, og at hon meinar tað í álvara, sæst aftur í, at hon hevur tikið fleiri av venjaraskeiðunum og um stundir verða til tað, kundi hon hugsað sær at farið undir »Slóðaran« í vár.

– Tað er heilt øðrvísi at vera venjari, enn at vera spælari. Eg fór undir tað í fyrraárið, men eg havi upplivað tað soleiðis, at tað er blivið meira og meira spennandi, meira eg eri komin inn í tað, so nú gleði eg meg til hesa nýggju uppgávuna við Víkingi.

– Sum nú er, sær út til, at tað verður nøkulunda sama liðið, sum tað var í fjør. Onkur er farin, men onkur er hinvegin komin aftrat, so hetta verður bara heilt spennandi at fara undir. Ikki minst, nú Víkingur við nýggju kvinnunevndini sær út til at vilja gera uppaftur meira við kvinnufótbóltin.

Við hesi nýggju nevndini vil felagið gera sítt til, at kvinnufótbólturin fær fastari og tryggari karmar at virka undir, umframt at Víkingur fær víst, at felagið vil gera álvara av sínum kvinnufótbólti. Tað verða kvinnur, ið koma at manna nevndina, so tær tann vegin eisini kunnu fáa størri ávirkan og gera seg galdandi í hesum parti av felagsarbeiðinum.




**Eftir tvey ár sum venjari á Skála, skiftir Ingun Hansen nú til Víking, har hon sum venjari eisini kemur at samstarva nógv við nýggju kvinnunevndina**

Mynd: FSF

# KÍ-kvinnur ikki raktar av kreppu

**– Hóast kvinnuliðið hjá okkum ikki fær almennan stuðul til europeiskan fótbólt í ár, tí tað hevur løgtingið spart burtur, fer fíggjarstøðan ikki at ávirka heimligu kappingina hjá teimum, sigur KÍ-formaðurin, Tummas Lervig**

Kvinnurnar hjá KÍ hava tey mongu seinnu árini verið í serflokki. Síðani 1997 hava tær vunnið 11 meistaraheiti, harav tey síðstu 10 á rað, og síðani 2000 hava tær sjey ferðir vunnið steypakappingina. Tá tað í sama tíðarskeiði hevur verið tilsvarandi lítið um besta mansliðið, er tað ikki so løgið, at kvinnurnar verða umrøddar sum flaggskipið hjá KÍ.

– Vit gleðast í øllum førum um, at kvinnurnar ganga undan í allar mátar í felagnum, tí tað er jú ikki bara í fótbólti, at tær gera um seg. Eisini kvinnurnar hjá Stjørnuni hava vunnið alt, sum vinnast kann, so tann parturin av okkara virksemi hevur riggað væl, ásannar formaðurin í KÍ, Tummas Lervig.

Nú felagið fekk ein frammaná í sambandi við Tony Paris-málið og mátti av við yvir hálva millión, er upplagt at spyrja, um sperda fíggjarstøðan eisini fer at ganga út yvir kvinnufótbóltin í Klaksvík, men formaðurin er ikki í løtuni førur fyri at siga, hvussu verður við tí.

– Tað einasta, vit vita í løtuni, er at játtanin á fíggjarlógini til fótbóltin er tikin burtur. So okkara kvinnur fáa ikki í ár tær 100.000 krónurnar, tær fingu í fjør til europeiskan fótbólt. Tað er sjálvandi eitt bakkast, men ávirkar ikki nakað í heimligu kappingini. Kvinnurnar í felagnum hava víst vegin fram, og tær koma framhaldandi at byggja á tað góða arbeiði, sum frammanundan er gjørt á teirra umráði, sigur hann.

– Eg vil siga tað soleiðis, at hóast vit repa seglini fíggjarliga, ætla vit ikki at gera tað ítróttarliga. Og fyri okkum í nevndini verður tað ein lætti, at vit ikki skulu hugsa so nógv í krónum og oyrum, sum vit hava verið noydd at gjørt tað áðrenn. Tað gevur meira pláss fyri at arbeiða við tí ítróttarliga, sum er tað, vit mest vilja sleppa at arbeiða við.

hil